VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og sirm ella mjørki. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið hósdagin:
Um morgunin hvassur vindur av útnyrðingi og ælingur, men hann minkar vindin skjótt til lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Upp í ein strúk av landsynningi og leygardagin møguliga turt, men sunnudagin regn. Hitin millum 8 og 12 stig.

Herfuglur sæddur í Bø

Ein Herfuglur, sum er sera sjáldsamur um okkara leiðir, varð herfyri sæddur í Bø. Fuglurin heldur annars til í Suðureuropa

FORKUNNUG VITJAN
Edvard Joensen

Tann 9. mai varð ein Herfuglur sæddur beint uttan fyri bygdina í Bø. Hetta er sera sjáldsamur fuglur um okkara leiðir, men hevur tó verið sæddur í Føroyum áður.

Gutti Petersen í Sandavági var hendan dagin sjálvur fjórði farin ein túr Norður í Haga uttanvert Bø. Á veg heim aftir í bili, sóu øll fýra fólkini hendan sjáldsama fuglin sita beint heiman fyri Ryssugilið.

Gutti Petersen sigur, at hann var beinan veg greiður yvir, at talan var um ein herfugl. Hann kendi hann frá myndum á tí sjáldsama høvuðprýðinum, fuglurin hevði.

Hann steðgaði bilinum og skundaði sær út við myndatóli at royna at fáa eina mynd av honum. Men tá fleyg fuglurin undan, og mynd fekst eingin. Tey sóu kortini fuglin fara heimeftir, og fylgdu honum í bilinum, til tey mistu hann burtur, tá hann fleyg oman um vegin á Stelkaskorum.

Herfuglur eigur í Suðureuropa suðuri við Miðalhavið. Hann ferðast av og á norðureftir, men er sera sjáldsamur os norðalaga sum í Føroyum.

Tó er hann sæddur her fyrr, veit Gutti Petersen, at siga. Og eisini í Vágum. Tá hann segði einum sandavágsmanni, sum skil hevur á slíkum, frá hesum fuglinum, visti hesin at siga, at fyri nørkum árum síðan varð ein annar sæddur í Lírurðunum beint norðanvert bygdina í Sandavági.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	2
Nuuk	2
Qaqortoq	4
Ammassalik	6
Saint John's	8
Halifax	11
Reykjavík	9
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	9
Lerwick	11
Aberdeen	13
London	19
Tromsø	15
Bergen	12
Oslo	–
Stokkhólm	20
Keypmannah.	15
Helsinki	17
Moskva	24
Berlin	16
Warzawa	29
Kiev	18
Bukarest	23
Paris	18
Madrid	17
Róm	22
Malorca	20
Athen	24
Malta	23
Tunis	21
Beijing	28
New Dehli	37
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	16
New York	11
Miami	28
Los Angeles	18
Meksikobýur	24
Panama	–
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	16

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst, 1001 hPa. eystan fyri Ísland grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1000 hPa. á 47N-30V fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikunáttina.



Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing og hevur regn og mjørka við sær á okkara leiðum.

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/05 kl. 06⁰⁰– 27/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,7°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0mm – mált frá 26/05 kl. 06⁰⁰–27/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 95,6 mm

BILLUTIR
T A T
T T
A A A
A UT
tlf. 421605 fax 421666

VESTFALLSKYRRINDI

23. mai: Seinna kvarter
28. mai: Mánin longst frá jørðini
31. mai: Tendring

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
28. mai	05.38	17.58	04.38	16.58	04.53	17.13	07.38	19.58	08.38	20.58	03.53	16.13	02.53	15.13	05.53	18.13	06.53	19.13	05.23	17.43	06.38	18.58
29. mai	06.17	18.37	05.17	17.37	05.32	17.52	08.17	20.37	09.17	21.37	04.32	16.52	03.32	15.52	06.32	18.52	07.32	19.52	06.02	18.22	07.17	19.37
30. mai	06.57	19.18	05.57	18.18	06.12	18.33	08.57	21.18	09.57	22.18	05.12	17.33	04.12	16.33	07.12	19.33	08.12	20.33	06.42	19.03	07.57	20.18
31. mai	07.39	20.00	06.39	19.00	06.54	19.15	09.39	22.00	10.39	23.00	05.54	18.15	04.54	17.15	07.54	20.15	08.54	21.15	07.24	19.45	08.39	21.00

5 707265 100036 >